gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

### Sjálvræði – men ikki í blindum

Oddagreinin í Fregnum hevur lagt tónan í komandi valstríði: "Velur tú Sambands- ella Javnaðarflokkin, sigur tú JA til danskar pengar. Velur tú sjálvstýrisflokkarnar, sigur tú NEI til danskar pengar."

Somuleiðis verður hildið, at "Sambands- og Javnaðarflokkurin eru garantar fyri donskum pengum og harvið donskum yvirvaldi". Men sambært Fregnum koma vit ikki í ta støðu, tí "Sjálvstýrisvongurin stendur til greiðan sigur, og vit stevna móti føroyskum sjálvræði."

Vónandi stevnir føroyska tjóðin fram ímóti sjálvræði, tó ikki í blindum, sum lagt varð upp til í fullveldisætlanini hjá landsstýrisflokkunum, men hóvliga og við skynsemi!

Javnaðarflokkurin legði upp til seinasta átakið ímóti størri sjálvræði í 97. Flokkurin heldur eisini, at danska peningaveitingin til Føroya eigur at minka í stigum. Tað er lítið vunnið, um føroyingar aftur rýma í túsundatali, tí búskaparliga grundarlagið varð rykt undan tjóðini í fáfongd!

Flestu føroyingar munnu hava ásannað, at danska stjórnarvaldið letur ikki pening til føroyingar, tí teir eru so góðir við okkum, ella virða okkum sum tjóð. Støpan nú, og søgan, sum Fregnir hava gjørt sítt til at leggja fram, vísir, at danska stjórnarvaldið vil ikki missa føroyska økið. Orsøkin er helst prestisja og harafturat hava Føroyar framvegis ómetaliga stóran týdning í trygdarpolitiskum - ella hernaðarligum - høpi. Tó skulu vit ikki grunda okkara framtíð á, hvat danskir politikarar ella ein amtmaður gjørdu og hildu fyri fimmtifimm árum síðani, men á tað, sum vit halda vera best og rættast fyri føroysku tjóðina ídag og komandi.

Tí er spurningurin ikki so einfaldur, sum Fregnir gera hann til. Føroyingar skilja eisini munin millum hvítt og svart. Teir duga somuleiðis at hugsa klárt. Harafturat má Fregnir eisini gera sær greitt, at sjálvstýrisvongurin er ikki ein homogen rørsla, líka lítið, sum flokkar eru ein homogen eind. Mangir fólkafloksveljarar eru líka lítið sjálvstýrissinnaðir sum sambandsmenn. Teir vilja tryggja kapitalinum valdið, og nøra at sær við privatiseringum ella útlisiteringum. Og munnu ikki mong javnaðarfólk vera eins góður partur í sjálvstýrisrørsluni, sum mong av teimum, sum fyrstuferð, ella av tilvild, valdu Tjóðveldisflokkin seinast í kappingini millum "Høgna ella Jóannes"!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkakirkjan somu treytir sum fríkirkjur

**Durita Djurholm**



Uppskotið um sjálvsstýri Føroya fólks er samtykt og harvið er avgjørt, at fólkakirkjan skal undir føroyskt málsræði í seinasta lagi 1. januar 2002.

Tá eitt økið verður yvirtikið merkir tað, at vit í Føroyum taka ábyrgd av hesum øki. Tað er ikki neyðugt at yvirtikna málið verður skipað eftir donskum leisti, men tað er haraftur ímóti neyðugt, at yvirtøkur verða lagaðar til føroysk viðurskifti.

**Fólkakirkjan umskipast**

Nú fólkakirkjan verður yvirtikin, eiga vit at skipa eina føroyska kirkju, sum er óheft politiskt og fíggjarliga. Fólkakirkjan eigur at verða fíggjað og skipað av teimum, sum ynskja at verða limir í kirkjuni og annars hava eitt hjarta fyri kirkjuni.

Verandi ríkisgrundlóg inniheldur ásetingar, sum geva fólkakirkjuni eina serstøðu. Lógin tryggjar ”religionsfrihed, men ikke religionslighed”. Hetta merkir, at vit hava trúarfrælsi, men at kristnir trúarbólkar hava ikki somu treytir, við tað at fólkakirkjan hevur eina grundlógartryggjaða serstøðu.

Nú nýggj grundlóg verður smíðað, eigur serstøðan hjá fólkakirkjuni at verða tikin burtur. Er tað ikki ódemokratiskt at geva einum kristnum trúðarbólki serstøðu fram um onnur kristin trúðarsamfeløg ?

**Fólkakirkjan fíggjast av kirkjufólki**

Landsstýrið metir, at tað fer at kosta eini 15 mió. kr. at yvirtaka fólkakirkjuna. Hóast kirkjufólk rinda kirkjuskatt, fíggjar hetta minni enn helmingin av virkseminum hjá kirkjuni.

Sum støðan er í dag, rinda allir føroyskir skattgjaldarar, kirkjufólk sum ikki kirkjufólk, til fólkakirkjuna, við tað at 3 mio kr. eru avsettar á fíggjarlógini fyri 2001 til Føroya Kirkjugrunn. Harafturat rinda danskir skattgjaldarar (danski statskassin) 12-13 mió. kr. til prestalønir, bispalønina, rakstur av prestagørðum og Føroya Stiftsstjórn.

Fólki, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni, nýtist ikki at rinda kirkjuskatt, men tey rinda óbeinleiðis til fólkakirkjuna yvir skattin, við tað at skattgjaldarans peningur verður nýttur til fólkakirkjuna. Hetta gjald verður størri, um fólkakirkjan verður yvirtikin og skipað, sum hon er ídag.

Hví skulu ikki-kirkjufólk rinda fyri fólkakirkjuna? Nógv av teimum, sum standa uttan fyri fólkakirkjuna, eru limir í fríkirkjum og vilja heldur stuðla hesum fíggjarliga.

Um fólkakirkjan í Føroyum skal rindast yvir kirkjuskattin, eigur kirkjuskatturin at verða ásettur, soleiðis at hann fíggjar fólkakirkjuna.

Í oddagrein í Trúboðanum 3. mai í ár mælir Tom Skaale, aðalskrivari, til, at fólkakirkjan verður loyst frá politiska valdinum, og at fólkakirkjan sjálv fíggjar virksemi sítt. Tað eru sostatt eisini røddir innan fólkakirkjuna, sum ynskja eina frælsa og fíggjarliga sjálvberandi kirkju.

**Kirkjan røkir landsumsiting**

Kirkjan røkir nakrar landsuppgávur sum t.d. at føra kirkjubøkur. Slíkar landsuppgávur eiga at verða lagdar yvir í landsumsitingina, soleiðis at kirkjufólk einans rinda fyri kirkjuvirksemi, - og ikki fyri almennar umsitingaruppgávur.

**Fólka-/statskirkjur aðra staðni**

Við árskiftið 2000 bleiv svenska kirkjan loyst frá statinum. Kirkjan verður fíggjað av kirkjulimunum sum kirkjuskattur. Kirkjusóknini skipa og áseta kirkjuskattirnar, sum í flestu førum eru 1-2%. Fólk uttan fyri kirkjuna rinda eitt serligt gjald fyri jarðarferð (begravningsafgift). Staturin í Svøríki hjálpir tó statskirkjuni til at halda kirkjubygningar viðlíka, sum hava eitt mentunarligt virði, tí tað kann vera sera kostnaðarmikið at varðveita gamlar bygningar.

Í Finlandi er kirkjuskatturin 1%, sum er 0,70% hægri enn í flestu kommunum í Føroyum.

Í Danmark rindar staturin 40% av prestalønunum og 100% av lønunum hjá biskoppunum.

Europaráðið hevur biðið Danmark hava eftirlit við, hvussu serstøðan hjá fólkakirkjuni verður umsitin. Ole Espersen, fyrrv. umboðsmaður fyri mannarættindi og núverandi professari í fólkarætti og mannarættindum á Københavns Universiteti sigur í grein í Kristiligt Dagblad hin 10. apríl 2001, at ” Hvis den danske folkekirkes særstatus bliver bragt for den europæiske menneskerettighedsdomstol, risikerer Danmark at blive dømt”. Grundgevingin fyri hesum er, at statsstuðulin til eitt ávíst trúarsamfelag er í stríð við millumtjóða sáttmálarnar í EU, sum tryggja trúarfrælsi.

**Átrúnaðarligt frælsi**

Vit hava frælsi til at trúgva tað, vit vilja, og at skipa okkum í samkomur og felagsskapir. Slíkir felagsskapir verða fíggjaðir av fólki, sum føla ábyrgd og brenna fyri sakini. Almennur stuðul verður ikki latin fríkirkjum o.t., - og hetta er gott og rætt.

Nú føroysk grundlóg verður smíðað, eigur fólkakirkjan ikki at fáa øðrvísi treytir enn onnur trúðarsamfeløg. Eg haldi ikki, at Føroyar verða minni kristnar av hesum. Í USA er eingin statskirkja, men fólk ganga kanska meiri í kirkju har enn hjá okkum.

Gudstrúgvin og trúðarsamfeløg eru persónlig viðurskifti, sum ikki eiga at verða fíggjað og skipað av tí almenna, men trúðarfrælsi má verða tryggjað í grundlógini.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Hví brúkar landsstýrið ikki sjálvsavgerðarrættin?

**Jóannes Eidesgaard**



Heldur enn at gera sjálvsavgerðarrættin til ein retoriskan spurning, sum heldur lív í einum endaleysum orðadrátti, so stendur tað sitandi samgongu og landsstýrið púra frítt at gera brúk av sjálvsavgerðarrættinum her og nú. Er tað tykkara ynski at fremja loysingina, so er tað hvørki Føroya Løgting ella Fólkatingið, sum vil forða tykkum. Tit eiga meirilutan á Løgtingi og hava fingið tilsøgnina frá øllum Fólkatinginum.

Hvat er tað, sum sitandi samgonga og sitandi landsstýrið ræðist? Ongantíð fyrr hevur loysingin ligið so greið, sum beint nú. Men tað er sum um, at landsstýrið við ljós og lykt leitar eftir undanførslum, so teir sleppa undan at fremja loysingina, sum teir annars til alla aðra tíðir siga er teirra hægsta ynski. Ræðast teir nú málið?

20. apríl samtykti ein meiriluti á Løgtingi at farast skuldi undir eina miðvísa fullveldisætlan, meðan upprunaliga ætlanin frá 1998 var jú, at fullveldið skuldi fremjast í hesum valskeiðnum. So hetta er eisini í tráð við samgonguskjalið hjá sitandi samgongu. **So Løgtingið kann ikki verða ein forðan, tí samgongan eigur jú meirilutan á tingi.**

Seinasta ónsdag fingu vit greiðu boðini frá einum samdum Fólkatingi, at er tað loysingina, føroyingar ynskja, so vil sami breiði meiriluti stuðla ætlanini. Viðtøkan, sum varð gjørd í samband við spurnarorðaskiftið sigur m.a.: "Folketinget tilkendegiver, at det er den færøske befolkning, der afgør Færøernes fremtidige tilknytningsforhold til Danmark. Det gælder såvel et ønske om at etablere en suveræn stat som et ønske om at udvikle samarbejdet inden for rigsfællesskabet." **So Fólkatingið kann heldur ikki verða ein forðan.**

Stjórnin hevur haraftrat manga ferðir sagt, at ynskja føroyingar loysing, so fáa vit loysingina. **So stjórnin er heldur ikki ein forðan.**

Tá menn í landsstýrinum hava havt so ilt við at kunna góðtaka tað, sum grundlógin sigur um loysingina, m.a. at henda skal góðkennast av stjórnini og einum meiriluta á Fólkatingi, so er hetta bert at síggja sum tann reini formalitetur, tí breiði meirilutin á Fólkatingi og stjórnin hava givið teirra tilsøgn. Har liggur so eingin forðan.

So vegurin liggur greiður, um vilji er at fremja málið.

Men í staðin fyri at vera maður fyri sítt orð og taka loysingina, so rennur landsstýrið nú undan sínum egna politiska ynski - rennur undan málinum. Í staðin fyri at fara til arbeiðis, so uppfinnur man ymiskar retoriskar undanførslur. Og sjálvandi fáa øll onnur enn teir sjálvir skyldina fyri, at einki hendur.

Er tað ikki Javnaðarflokkurin og andstøðan, so er tað danska stjórnin ella Fólkatingið, meðan veruleikin er, at tað stendur landsstýrinum frítt at fremja loysingina. Er tað dirvið sum bilar monnum?

Eftir er bara at fáa Føroya fólk at taka undir við ætlanini. Sambært landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum so er tað als eingin trupulleiki.

Setið nú ætlanina í verk, so vit kunnu koma víðari burturúr hesi naggatódnini, føroyskur politikkur er komin í!

Treytin við fýra ára skiftistíð kann neyvan verða nøkur forðing. Við stórum yvirskoti í Landsbankans likviditeti og við at selja almennu ognirnar, so er búskaparligi parturin sambært tykkum sjálvum als eingin trupulleiki.

Tykkara ivi og drálan fær okkum onnur at spyrja, um alt hetta í seinasta enda bert er ein sjónleikur? Tit vilja hava loysing, loysingin liggur greið, men her hendir einki annað enn orðadráttur og skuldsetingar. Er hetta tað viljaloysið, sum eftirtíðan eftir øllum at døma man fara at skíra tykkara tørvandi avreksverk.

Tykkara vitjunnartíð er nú, loysingin hevur ongantíð ligið greiðari, avgerðin er tykkara. Vit onnur kunnu bert siga, at vit halda avgerðina vera skeiva. Men hesum eru tit ikki samdir við okkum í - ella eru tit kanska samdir innast inni?

Tað kann væl ikki hugsast, at landsstýrið ræðist eina fólkaatkvøðu um loysingina - ræðist fólksins dóm? Um tað er so, at landsstýrið ræðist fólksins vilja, so er tíðin búgvin til at útskriva løgtingsval, so vit kunnu fáa eina arbeiðsføra samgongu.

# Dugir Tjóðveldisflokkurin gand ?

**Helgi Abrahamsen**



Seinasta leygardag hevði Tjóðveldisflokkurin eina grein í Dimmalætting, sum kallaðist "Tað ber til".

Endamálið við greinini var at billa Føroya fólki inn, at fullveldisætlanin búskaparliga hongur saman. Ein talva var eisini saman við greinini, og hon skuldi líkasum undirbyggja pástandirnar sum stóðu í sjálvari greinini.

Føroyskur búskapargrunnur við donskum pengum

Sambært greinini og talvuni, byggir øll tillagingarætlanin hjá landsstýrinum á ein búskapargrunn.

Fyrstu ferð hesin grunnur varð nevndur, var tá landsstýrið endaliga fekk staðfest, at dreymurin um 15 — 20 ára skiftistíð úr danska statskassanum ikki gjørdist veruleiki. Tá varð sagt, at landsstýrið nú fór at skipa sína "egnu tryggu skiftistíð".

Men nú vísir rokniarkið hjá Tjóðveldisflokkinum, at um grunninum skal verða lív laga, so má hann fáa blokkstuðul úr Danmark, annars verður hann tómur longu í 2003.

\- Soleiðis royndist "okkara egna trygga skiftistíð" tá til stykkis kom.

**Brúka somu pengar tvær ferðir**

Einastu føroysku pengarnir í búskapargrunninum er sjálvt stovnsfæið.

Í fleiri ár hevur landskassin undir verandi heimastýrisskipan havt yvirskot, og hetta yvirskotið er sett inn í Landsbankan. Nú er so ætlanin hjá fullveldislandsstýrinum at taka eina milliard úr Landsbankanum, og seta hana í búskapargrunnin. Hesin peningur skal síðani flytast yviraftur í landskassan til alment forbrúk (700 mió. krónur fyrsta árið, og síðani skal upphæddin minka við 50 mió. krónum fyri hvørt eftirfylgjandi árið).

Men tað løgna er, at tað sæst ongastaðni á útreiðslusíðuni á talvuni hjá Tjóðveldisflokkinum, at 1 mia. krónur verða tiknar úr Landsbankanum í 2001. Men tá peningurin kemur innaftur í landskassan, verður hann kortini roknaður sum inntøka.

Tað vil siga, at somu krónur koma tvær ferðir inn í landskassan, uttan at tær nakrantíð verða tiknar út ímillum.

Við at taka 1 milliard út, og síðani seta hana innaftur, verður landskassin á pappírinum 1 milliard krónur ríkari. Ein freistast til at spyrja, hví landsstýrið so ikki ger hetta sama kynstrið fleiri ferðir, fyri harvið at gerast uppaftur ríkari.

**Krógva veruleikan**

Nú veit eg, at ein roknskapur kann setast upp á nógvar ymiskar mátar, og tá tað er ein búskaparfrøðingur, sum hevur gjørt hasa talvuna, loyvi eg mær at ganga út frá, at hon er innanfyri allar galdandi reglur.

Eg ivist tó onga løtu í, at endamálið hjá Tjóðveldisflokkinum við at nýta talvuna í fjølmiðlunum, er at krógva veruleikan fyri Føroya fólki. Føroyingurin má ikki sleppa at síggja, at sjálvt um vit skuldu fingið blokkstuðul úr Danmark heilt fram til 2012, so hevði loysingarætlanin kortini ikki hingið saman. Føroyingurin má ikki síggja, at ein milliard hvørvur "í allari stillheit".

Hvussu verður so støðan við einans 4 ára skiftistíð?

